# Pílagrímsferð av Nesi til Fuglafjarðar

**Vikuskiftið 26.-27. september skipar 62ºN fyri pílagrímsferð í Eysturoynni**

**PÍLAGRÍMSFERÐ**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ferðin byrjar við Nes kirkju leygardagin 26. september og endar í Fuglafjarða kirkju seinnapartin sunnudagin við eini pílagrímsguðstænastu.

Tað er danski pílagrímspresturin, Elisabeth Lidell, sum aftur vitjar í Føroyum.

- Gingið verður til Æðuvíkar og víðari til Rituvíkar. Í Rituvík verður steðgur og vit eta matpakka. Hildið verður fram til gongu til Lamba har vit aftur steðga á. Dagurin endar í Syðrugøtu við einum døgurða, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Sunnumorgun verður vitjað Blásastovu áðrenn farið verður í Gøtu kirkju.

- Aftan á kirkjugongdina gongur leiðin til Varmakeldu, har vit gera ein steðg og eta matpakka. Síðan halda vit áfram, og ferðin endar við pílagrímsandakt í Fuglafjarða kirkju sunnudagin, siga tey.

Á ferðini verður steðgað av og á og Elisabeth Lidell setur fokus á lívið sum eina pílagrímsferð.

Í fjør, tá hon vitjaði, var pílagrímstúrurin í Vágum.

Elisabeth Lidell er pílagrímsprestur í Århus. Hon hevur brúkt nógva tíð upp á at greiða frá og geva pílagrímshugtakinum eitt týðandi pláss í fólkakirkjuni.



*Pílagrímsferðin byrjar við gomlu Nes Kirkju*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, út á seinnapartin lot av ymsum ættum. Sólglottar, men eisini ælingur. og hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av vestri, um kvøldið frískar hann vindin av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Týsdagin minni vindur og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 15 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 16 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu mátt:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 977 hPa. yvir Norður-Íslandi fer eisini í landnyrðing og dýpist.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Føroyar stendur mestsum í stað og grynnist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/08 kl. 06[00] – 13/08 06[00]. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í august: +0,4° -
Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 12/08 kl. 06[00] – 13/08 06[00].
Avfallið higartil í august: 32 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

19. august — Mánin næstur jørðini
20. august — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20.aug | 07:08 | 19:34 | 06:08 | 18:34 | 06:23 | 18:49 | 09:08 | 21:34 | 10:08 | 22:34 | 05:23 | 17:49 | 04:23 | 16:49 | 07:23 | 19:49 | 08:23 | 20:49 | 06:53 | 19:19 | 08:08 | 20:34 |
| 21.aug | 07:59 | 20:24 | 06:59 | 19:24 | 07:14 | 19:39 | 09:59 | 22:24 | 10:59 | 23:24 | 06:14 | 18:39 | 05:14 | 17:39 | 08:14 | 20:39 | 09:14 | 21:39 | 07:44 | 20:09 | 08:59 | 21:24 |
| 22.aug | 08:48 | 21:12 | 07:48 | 20:12 | 08:03 | 20:27 | 10:48 | 23:12 | 11:48 | - | 07:03 | 19:27 | 06:03 | 18:27 | 09:03 | 21:27 | 10:03 | 22:27 | 08:33 | 20:57 | 09:48 | 22:12 |
| 23.aug | 09:35 | 21:59 | 08:35 | 20:59 | 08:50 | 21:14 | 11:35 | 23:59 | 00:12 | 12:35 | 07:50 | 20:14 | 06:50 | 19:14 | 09:50 | 22:14 | 10:50 | 23:14 | 09:20 | 21:44 | 10:35 | 22:59 |
| 24.aug | 10:22 | 22:46 | 09:22 | 21:46 | 09:37 | 22:01 | - | 12:22 | 00:59 | 13:22 | 08:37 | 21:01 | 07:37 | 20:01 | 10:37 | 23:01 | 11:37 | - | 10:07 | 22:31 | 11:22 | 23:46 |




